FARTELEFONIR TIL SØLU
Ein Nokia 3410 + eyka cover fyri 700 kr. og ein 7650 lítið brúkt selist til hægstbjóðandi. Mín. 2.000 kr.
TV. 250872

NOKIA 6510
Ein Nokia 6510 10 mðr. Til sølu vegna keyp av nýggjari, hevur m.a. wap, fm radio o.m.a. Nýprísur 2400, til sølu fyri 1200, ladari og headsett fylgir við
TV. 211689

TAKKARHEILSAN
Til tykkum øll, sum hava stuðlað felagnum á ein ella annan hátt, takka vit hjartaliga. Gleðilig jól og gott nýggjár.
Vága Svimjifelag

HUGNAKVØLDIÐ Á KELDU Í SKÁLAVÍK
við føroyskum dansi, dansespælum og gamlamannadansi, verður 3. januar kl. 20.00. Tilmelding áðrenn mánadagin 29. des. 08 kl. 19.00 á tlf 361359, 361101, 361695 ella 211486. Øll annars uppteg í handlunum.
Dansifelagnir í oyggi

HYGG HER!
Ein Nokia 3310 við nýggjum batterii til sølu fyri 500 kr.
TV. 21 703420 eftir kl. 0689, Hjørtur

TIL SØLU
1 par av Salomone-slalom ski brúktar + skiestavar, 1 par turski, 1 par slalom støvlar str. 40 til sølu.
TV. 4485026

NOKIA TIL SØLU
Ein sera góð Nokia 3310 við ladara til sølu fyri 600 kr.
TV. 258411

MOTOROLA C350
1 mánaða gamul við litskermi, polyfonisknum ringitónum, spælum, vibrator, kalendara, GPRS og mangt annað. Headsett fylgir eisini við. Til sølu fyri einans 850 kr. Send mær ein mail:
kd@post.olivant.fo

BJARGINGARVESTUR
Lítið brúktur bjargingarvestur 15-30 kg til sølu fyri 150 kr.
TV. 21 7880 eftir kl. 18

NOKIA 3650 TIL SØLU
fyri 2000 kr. Ladari fylgir við. Telefonin hevur innbygt digitalt kamera, spæl og video, kann upptaksti 1 min. 16 megabyte pláss í ttf o.m.a.
TV. 250537

SONY ERICSSON P800 TIL SØLU
Framkomin fartelefon/PDA, við høpin av henfelikum so sum: Digitaltmyndatøl, MP3 spælara, kalendara, email, sms, mms o.a. Telefonin kann synkroniserast við Notes/Outlook. Hon hevur trístáltsomman litskerm við penni. 16Mb Memory stick + 64Mb eyka. Telefonin er 1/2 ára gomul og í góðum standi. Prísuppskot 3500,-
Ring á 225423 eftir kl 15

VIKUSKIFTIS FLOGFERÐ
við Atlantic til Keypmannahavnar við avsláttri.
TV. 314585

KONDISSÚKKLA
Einki brúkt kondissúkkla til sølu fyri 2.000 kr. Nýprísur 3.000 kr.
TV. 422082/268582

SONY ERICSSON T68i
Sony Ericsson T68i (hevur WAP, MMS og Bluetooth) við FM radio og digitalum myndatøli til sølu fyri 1600 Nýprísur 3.885,-
TV. 259173

TIL SØLU
Sd yvirpartur til sølu fyri 1.000 kr.
TV. 481642

VIDEOCAMERA
Sony hi-8 videocamera 240xzoom 3 ára gamalt, Lítið brúkt Nýprísur 6.500,- Til sølu fyri 2.500,-
TV. 223468

TIL SØLU
ISDN-modem til sølu fyri 500 kr.
TV. 222610

NOKIA TIL SØLU
2 mðr gomul Nokia 3510i til sølu fyri 800,-
TV. 266314

FAROE LAW

bjóðar heimligar og altjóða loysnir

Tosið við:
Eyðfinn Jacobsen, advokat
ella
Kára á Rógvi , adv.fulltrúa
um tygara tørv

Tróndargøta 19
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 - fax 359901
mobil 219902 - 222857
faroe-law@faroe-law.fo

http://www.faroe-law.fo

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:

Skrásetingar-nr. P/F 3689
Navn: P/F Fastognarfelagið Føroyar
Hjánavn: P/F Fastogn (P/F Fastognarfelagið Føroyar)
Adressa: Tinghúsvegur 14, 100 Tórshavn.
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 15.12.2003
Viðtøkudato: 15.12.2003
Kapitalur: Kr. 42.000.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 1.000.000,00 til kurs 100 og kr. 41.000.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnarar: P/F Kaupthing Føroyar Virðisbrævameklarafelag, 100 Tórshavn (P/F 2997), P/F SMS, 100 Tórshavn (P/F 207) og P/F Handilskjarnin, 100 Tórshavn (P/F 2413).
Nevnd: Hans Mortensen, Gróthúsvegur 6, 188 hoyvík (formaður), Christian Andreasen, Høvdagøta 6, 160 Argir og Schumann Hjaltalin, Mýrisnípuvegur 6, 100 Tórshavn.
Stjórn: Evy Jacoba Jacobsen, 370 Miðvágur.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið av stjóranum ella av tveimum valdum nevndarlimum.
Grannskoðari: Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 15.12.2003 - 31.12.2004
Endamál: Endamál felagsins er at byggja, eiga og reka fasta ogn og allan handil í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 17. desember 2003

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3696
Navn: Sp/f m-Data
Adressa: Brobbersgøta 8, 100 Tórshavn.
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 19.12.2003
Viðtøkudato: 19.12.2003
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Martin Dam, Brobbersgøta 8, 100 Tórshavn.
Stjórn: Martin Dam, Brobbersgøta 8, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.
Grannskoðari: P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2003 - 31.12.2003
Endamál: Endamál felagsins er at veita kt-tænastur, reka handil og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 19. desember 2003

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3692
Navn: Sp/f BK
Adressa: Tróndargøta 39, Box 227, 110 Tórshavn.
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 20.11.2003
Viðtøkudato: 20.11.2003
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Brian Kristoffersen, Rammetoften 9, DK-2950 Vedbæk.
Stjórn: Brian Kristoffersen, Rammetoften 9, DK-2950 Vedbæk.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: Óli Regin Hansen, Tróndargøta 39, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 20.11.2003 - 31.12.2004
Endamál: Endamál felagsins er at gera íløgur í og reka handil við virðisbrøvum o.a., veita ráðgeving í samband við leiðslu av feløgum og annað arbeiði í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 19. desember 2003

Kristin Balle

Frágreiðing:

Eftir § 91 í løgtingslóg um tryggingarvirksemi verður givin henda frágreiðing:

S/F Tryggingarfelagið Føroyar hevur søkt um loyvi at avhenda tryggingarmongdir til P/F Tryggingarfelagið Føroyar.

Avhendanin hendir í sambandi við at S/F Tryggingarfelagið Føroyar hevur gjørt av at avhenda øll síni aktiv í fyrsta umfari til Tryggingarfelagið Føroyar Holding P/F, men hvat viðvíkur allari sínari tryggingarmongd, beinanvegin viðari til Tryggingarfelagið Føroyar P/F og samstundis broytir S/F Tryggingarfelagið Føroyar navn til Ognarfelag Tryggingartakaranna.

At tryggingarmongdin verða avhendað ber ikki í sær, at tryggingartreytirnar verða broyttar, herímillum tryggingargjald fyri tryggingarnar, sum verða avhendaðar.

Tryggingartakarar við tryggingum, sum avhendanin fatar um, hava rætt til at mótmæla at avhendað verður. Avhendanin ber ikki í sær ein serligan rætt at slíta tryggingaravtaluna, jb. § 91, stk. 3 í løgtingslóg um tryggingarvirksemi. Verður mótmælt, skal tað verða gjørt skrivliga í seinasta lagi 31.04.2004.

Tryggingareftirlitið
Skálatrøð 20
100 Tórshavn

Tryggingareftirlitið, 23.12.2003

Sosialurin -tað loysir seg

HEILSANIR

Hey Eyðun
Her líkist tú rættuliga einum nissumanni. Hjartaliga tillukku við 8 ára degnum.
Ynskir jólamaðurin

Góði Eyðun
Hjartaliga tillukku við 8 ára degnum 23. des.
Bestu ynskir vit á Húsamørk

Góði Bjartur
Hjartaliga tillukku á 18 ára føðingardegnum jólaaftan. Takk fyri alla gleði tú gevur okkum. Og minst til - koyr varliga. Alt tað besta ynskja vit tær.
Mamma og babba

Sosialurin
www.sosialurin.fo

HEILSANIR

Hjartaliga takka vit øllum, sum vóru við til at gera okkum hjúnabandsdagin 28. juni 2003 so góðan og minnisríkan. Eisini ynskja vit familju, vinum og kenningum eini gleðilig jól og eitt av Harranum vælsignað nýggjár.
Joan og Jan Skorðalíð

Vit vilja hjartaliga takka øllum, sum á mangan hátt gjørdu brúðleypsdag okkara 19. juli 2003 ógloymandi. Takk fyri gávur, blómur og telegramm. Eisini vitja vit ynskja ætt, vinum og kenningum eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.
Borgny og Thomas Brünings-Hansen

Steen Lorentzen Persson
Góði elskaði beiggi. Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum.
Ynskir systir tín

Eg og foreldur míni takka hjartalig fyri vitjan, gávur, heilsanir og alla hjálpina á konfirmationsdegi mínum 5. okt. Gleðilig jól og eydnuberandi nýggjár.
Heilsan Svava Vestergaard

Eg og foreldur míni takka hjartaliga øllum, ið gleddu meg á konfirmatiónsdegnum 5. okt. 2003. Samstundis ynskja vit øllum eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár.
Barbara Tausen

Eg og foreldur míni takka hjartaliga øllum sum gleddu meg á konfirmatiónsdegnum 12. okt. 2003. Gleðilig jól og eitt eydnuberandi nýggjár.
Heilsan Oluf Johannesen, Skála

Eg og foreldur míni takka øllum sum á ymsan hátt hjálptu til og gjørdi dagin so hugnaligan á mínum fermingardegi 6. apr. 2003. Takk fyri gávur og vitjanir. Eitt av Harranum vælsignað nýggjár.
Heilsan Anja Eyðgerðardóttir Sørensen

Hey Bjartur
Tillukku við 18 ára degnum jólaaftan. Ja hetta vóru dagar. Og vit skulu við tann fyrsta biltúrin.
Allarbestu heilsanir frá Beintu, Róa, Rúna og Dianu

Eg og foreldur míni takka hjartaliga øllum sum gleddu meg á konfirmatiónsdegnum 13. apr. 2003. Gleðilig jól og eitt eydnuberandi nýggjár.
Heilsan Benjamin Joensen, Leirvík

Eg og foreldur míni takka hjartaliga øllum, ið gleddu okkum á konfirmatiónsdegi mínum tann 5. oktober 2003. Somuleiðis ynskja vit tykkum eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár.
Kærar heilsanir Anna Gaardlykke

Góða elskaði Josva
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku á 11 ára føðingardegnum 18. des.
Ynskja mamma, babba og Rakul

Hjartaliga tillukku við føðingardegnum 21. des.
Heilsan vinkonan í Froðba

Góði fitti Hannus
Hjartaliga tillukku við 9 ára føðingardegnum 22. des.
Heilsan mamma, babba og diddi

Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«